# Meirilutin í Klaksvík finnur saman aftur

**Mikukvøldið skuldi meirilutin í Klaksvíkar býráði tosa saman, og borgarstjórin heldur, at góðir møguleikar eru fyri at halda fram við starvinum seinastu fýra árini**

BÝRÁÐSVAL
*Eyðun Klakstein*

Seinastu fýra árini hava Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin myndað meirilutan í Klaksvíkar býráði, og Steinbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum hevur verið borgarstjóri. Møguleikar eru fyri, at júst hetta samstarvið heldur fram. Meirilutin varðveitti sín meiriluta, og allir flokkarnir høvdu framgongd. Harafturat sett Steinbjørn Jacobsen met í persónligum atkvøðum í Klaksvík.

– Úrslitið av valinum talar fyri, at samstarvið kann halda fram, og vit hava avtalað at fundast um hetta í kvøld, segði Steinbjørn Jacobsen mikudagin.

**Møguleikarnir góðir**

Meirilutin tosaði eisini saman valkvøldið, men gjørdu tá av at bíða eitt sindur við meira ítøkiligum práti, tí fólk vóru so troytt, og onkur nýggj fólk vórðu vald.

– Eg haldi, at møguleikarnir fyri at halda fram síggja góðir út, men so leingi, sum einki er avtalað, kann tað ikki sigast við vissu, sigur væl umtókti borgarstjórin í Klaksvík.

Hann vil einki siga um, hvørt samstarvið kann víðkast við øðrum flokkum ella kanska vera eitt samstarv millum allar flokkarnar.

Fyrst skal verðandi meiriluti tosa saman, og tað skuldu tey gera mikukvøldið.



*Eivør Pálsdóttir gevur seinni í hesum mánaðinum eina nýggja fløgu út, og í tí sambandi hevur hon konsert í Havn saman við kanadiumanninum Bill Bourne*

# Eivør við nýggjari fløgu á fýra málum

**Eivør Pálsdóttir hevur verið í studio í Reykjavík, og seinni í hesum mánaðinum kemur ein nýggj fløga út – sangirnir eru á føroyskum, íslendskum, svenskum og enskum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Týskvøldið 23. november hevur Eivør Pálsdóttir konsert í Müllers Pakkhúsi í Havn. Saman við henni fer at Bill Bourne at syngja og spæla.

Konsertin verður í sambandi við, at Eivør Pálsdóttir gevur nýggja fløgu út á íslendska plátufelagnum 12 Tónar.

11 sangir eru á fløguni, og teir eru tiknir upp í Thule Studio í Reykjavík. Eivør hevur seinnu árini sungið sangir á ymiskum málum, og hetta hoyrist aftur á nýggju fløguni. Har eru sangir á føroyskum, svenskum, íslendskum og enskum.

Eivør hevur sjálvt gjørt orð og lag til fimm av songunum, meðan hinir sangirnir eru coverløg. Ein av sangunum er Mær Leingist, sum hevur verið nógv at hoyra í ár.

**Einfaldur tónleikur**

Nýggja fløgan hjá Eivør er ein friðarlig fløgu, har røddin hjá Eivør er í miðdeplinum og bara fá ljóðføri verða nýtt afturat. Mesta av undirspælinum er akkustiskari gittar, kontrabass og slagverki.

Á heimasíðuni hjá Eivør ber til at hoyra broyt burtur úr sangunum á nýggju fløguni. Heimasíðan er at finna á adressuni www.eivor.com.

Eivør spælir framvegis sjónleik í Íslandi, og tað skal hon halda fram við til 12. desember. Men hon brúkar eina fríløtu til at koma heim til Føroya at hava eina konsert í sambandi við útgávuna.

Atgongumerki til konsertina í Müllers Pakkhúsi kunnu keypast í forsølu á Kunningarstovunum í Havn og Runavík.

Fløgan verður sett til sølu tann 24. november.

# Hørð kapping um fjórða plássið

**Klaksvík:** Fólkaflokkurin fekk aftur fýra umboð í býráðið, og tað var hørð kapping um tað fjórða umboðið hjá flokkinum.

Jákup Mikkelsen, Kristian Fríðrik Olsen og Gunvá við Keldu vóru væl frammanfyri hini, men Atli Justinussen, Erik Andreasen og Jan Gardar endaðu sera tætt.

Atli Justinussen hevði tó munin við sínum 116 atkvøðum, meðan hinir báðir fingu ávíkavist 109 og 106 atkvøður.

# KPMG verður til SPEKT

Eftir árskiftið fer grannskoðanarvirkið, KPMG, ikki longur at bera hetta heitið her í Føroyum.

Tá skiftir fyritøkan við Staravegin nenvliga nant til SPEKT.

Tað merkir tó ikki, at fyritøkan, sum Pauli Ellefsen grundlegði fyri nærum 30 árum síaðni, broytist stórvegis.

– Hetta er meira eitt úrslit av øllum gølunum, sum vóru í USA fyri fáum árum síðani. Tað hevur sett munandi hægri krøv til tann partin av virkseminum, sum KPMG stendur fyri. Serliga eru tað rapporteringarnar, sum eru vorðnar fleiri í tali. Rapporteringar, ið sum so einki hava við grannskoðanina at gera, sigur Finnbjørn Zachariassen, sum er ein av teimum fýra stjórunum í KPMG í Føroyum.

– Hartil eru krøvini í aðrar mátar eisini vorðin munandi størri í USA. Millum annað um, at fyritøkur, har KPMG grannskoðar, ikki skulu hava nakað sum helst annað tilknýti enn sjálva grannskoðanina til KPMG, og tað verður nærum ógjørligt her í Føroyum, sigur hann.

Víðari sigur hann, at SPEKT er ein sonevndur »Corresponding firm to KPMG International«. Tað vil siga, at burtur sæð frá sjálvum navninum, so verður tað als eingin broyting í virkseminum hjá føroysku fyritøkuni.

**-jm**



# Hart arbeiði fyri hvønn einstakan

**– Eg eri avgjørt nøgdur við valið. Var eg ikki tað, hevði eg verið ógvuliga ótakksamur fyri tann dygga stuðul, ið mær er veittur, sigur Dánjal Vang, sum var toppskorari í Fuglafjarðar kommunu**

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Dánjal Vang gjørdist enn einaferð toppskorari í Fuglafjarðar kommunu, hesaferð við 119 persónligum atkvøðum*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Hóast Dánjal Vang misti 61 atkvøður á valinum hesaferð, gjørdist hann kortini toppskorari við flestu persónligum atkvøðum. Samlaða talið hesaferð var 119 móti 190 við seinasta val.

– Jú, eg eri ovurfegin um úrslitið, sum er eitt úrslit av, at tú hevur arbeitt hart fyri hvønn einstaka borgara í kommununi í tíðini, sum farin er.

Dánjal Vang var valdur á tjóðveldislistanum seinasta, men var hesaferð á borgarligum lista, sum ikki er heftur politiskt.

Um minkandi atkvøðutalið, heldur hann, at hetta í fyrsta lagi kemst av, at fleiri listar vóru til hetta valið og tískil var minni í part. Somuleiðis kann tað hava havt sína ávirkan, at hann ikki hesaferð var uppstillaður á tjóðveldislistanum.

– Men eg eri serstakliga væl nøgdur við valið og álitið, ið veljarin hevur víst mær. Var eg ikki tað, hevði eg verið ógvuliga ótakksamur.

Dánjal heldur, at orsøkin til stóru undirtøkuna botnar í einum greiðum boðskapi til borgararnar.

– Tað, sum er umráðandi í politikki, er, at samanhangur er millum tað, sum sagt verður – og tað, sum verður gjørt, sigur toppskorarin, sum viðgongur at hava gjørt eitt stórt arbeiði undan sjálvum valinum við at seta seg í samband við fólk.

Hann heldur eisini, at tað hevur havt stóran týdning fyri útfallið av valinum, at listarnir, A og B, hava lagt út við, at teir eru sinnaðir at samstarva um bestu loysnirnar fyri kommununa.

– Men vit eru opnir fyri øllum samstarvi, sigur Dánjal.

Av níggju umboðum í bygdaráðnum, fingu listi A og B tey 5.

Tey, sum fullu á valinum í Fuglafjarðar kommunu, vóru Jóhan Heri Joensen á lista C og Magni Joensen á lista E. Petur Abrahamsen varð nývaldur á javnaðarlistanum og Signar á Brúnni á tjóðveldislistanum.

Kvinnulistin fekk eitt umboð. Tað er Elisabeth E. Olsen.

Sonevndi, Horna-listin, fekk einki umboð.

Sigurd S. Simonsen, sum hevur verið borgarstjóri í Fuglafirði seinastu árini, hevði eisini eitt gott val. Hann fekk 77 atkvøður á valinum hesaferð móti 59 atkvøðum á valinum seinast.

Nývalda bygdaráðið í Fuglafirði er nú soleiðis mannað: Dánjal Vang (A, 119), Eyðun á Lakjuni (A, 65), Jann Toftegaard (A, 40), Sigurd S. Simonsen (B, 77), Jón N. Olsen (B, 38), Petur Abrahamsen (C, 45), Signar á Brúnni (E, 51), Tórfríður Abrahamsen (E, 49) og Elisabeth D. Olsen (K, 82).



*Signar á Brúnni varð nývaldur á tjóðveldislistanum við 51 atkvøðum*
*Mynd: Jonhard Hammer*

FØÐINGARDAGSTILBOÐ
Tann 11.11.04 fyllir handilin
28 ÁR
Tað fagna vit við einum
SUPERTILBOÐIÐ
í okkara nýggja
NOA NOA miniature
handilin hinumegin vegin
(gentu klæðir 3-12 ár)
Hósdag - fríggjadag - leygardag
-28%
Av øllum NOA NOA miniature vørum
NOA NOA
Í Tróndargøtu 26-27
tel 318200